# Teknikapping í Sosialinum



Teknikappingin í Sosialinum er byrjað. Kapping er skipað soleiðis at hvønn dag til jóla, verður ein mynd av Jólamanninum Kjøtkróki í Sosialinum. Børnini skulu gera eina tekning, sum líkist so nógv sum gjørligt. Niðast á síðini er ein lepi, sum tit skulu klipsa saman við tekningini. Minnist til at tað skal verða ein lepi fyri hvørja tekning.

Tekninganir skulu verða okkum í hendi 27 desember. Tí tá kemur Kjøtkrókur oman í Miðlahúsið at finna vinnarin. Vinningurin er eitt gávukort á 1000 kr. frá einari av hesum fyritøkum:

**Hjá Gunleivi · Føroya Banki · Statoil BR-Leikur Føroya Lívstrygging · Føroya Bjór SMS · Tryggingarfelagið Føroyar · Kall Balslev · Føroya Tele · Skemman · MBM Daddan · FK · Rio Bravo · Nantong · Pizza 67 Farodane City · Vøruhúsið á Hjalla · Føroya Sparikassi · Atlantic Airways · Bowling Merlot · TelduTænastan · A.H.Jensen · Hjá Eli Smúkkuhjørnið · Postverk Føroya · Glas & List Atlanticpane**

Navn:____________________

Adressa:____________________

**Sendið til: Sosialurin · Box 76 · 110 Tórshavn. Merkið brævbjálvan "Teknikapping"**

# Showmenn og Frændur á sama pall

Størsti dansibólkurin í løtuni Showmenn og størsti dansibólkurin í 80'unum Frændur, fara 2. jólakvøld á pall í Mentanarhúsinum í Fuglafirði at spæla til ársins jóladans. Hetta verður eitt brak av einum dansi.



Showmenn hava í fleiri ár spælt til jólaborðhaldini á Hotel Føroyum, og eru vorðnir sjálv ímyndin av jóladansi. Frændur eru uttan iva tann mest fólkakæri tónleikabólkurin í Føroyum, ið hevur spælt fyri fullum hølum í 80'unum, 90'unum og í 0'unum. Eingin ivi er um, at gravgangurin eftir atgongumerkjum verður stórur, tí eru, hóast talan er um dans, atgongumerkið sett í forsølu.

Atgongumerkir fáast í forsølu hjá Haraldsen í Fuglafirði, Shell í Gøtudali, Kiosk Vár í Runavík og Kunningarstovuni í Havn. Bussar koyra av Strondum, Toftum, Sundalagnum, Eiði og Havn.

**nud**

# Børn eru í lívsvanda á føroysku vegunum

**Vandamiklarstøður standast øgiliga ofta av at børn og vaksin ganga í myrkum klæðum og uttan endurskin úti á vegunum**

**FERÐSLUTRYGD**
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Ráðið fyri Ferðslutrygd fær nógvar fráboðanir frá bilførarum um, at børn ganga úti uttan endurskin og í myrkum klæðum. Hetta hevur nógvar vandamiklar støður við sær, sigur Rúna Sivertsen formaður við Sosialin og heitir á foreldur um at tryggja sær, at børnini hava endurskin og eru í ljósum klæðum.

Aftur leygarmorgun var eitt barn tætt við at koma undir ein bil. Barnið var á sletu á alfaravegi, og var í myrkum klæðum og hevði einki endurskin, sigur Rúna, ið júst hevur tosað við skelkaða bilføraran.

Rúna vísur á, at nógvar kavadraktir í hesum døgum eru myrkar, og hetta er øgiliga óheppið. Tí er alneyðugt at foreldrini tryggja sær, at børnini hava endurskin. Tað er ikki nógmikið við endurskin á stúvlunum, hesi síggjast ikki í kava ella tá børnini skreiða. Tí er neyðugt við endurskinum um armar, á ryggi og aðrastaðni, jú, fleiri ju betri.

Tað er heilt ómøguligt hjá bilførum at síggja myrku børnini, og tey eru beinleiðis í lívsvanda, sum nú er. Eisini av løgreglustøðini í Havn siga tey seg kenna til trupulleikan, men siga, at tað í líka stóran mun er ein trupulleiki, at vaksin ganga í myrkum klæðum. Tá løgreglan koyrir runt í býnum, síggja tey í nógvum førum vaksin ganga úti í myrkum klæðum, eisini saman við børnum. Tey vaksnu eru fyrimyndirnar, og noyðast at vísa í gerum hvat góður ferðslusiður er. Um tey vaksnu ikki vilja nýta endurskin, kunnu tey heldur ikki vænta, at børnini gera tað.

Hesin blaðmaðurin kann bara leggja afturat, at hann var um at koyra á ein tingmann, tá hann bakkaði Snar út av parkeringsplássinum í seinnapartsregninum í gjár. Hesin var í svørtum klæðum og hevði einki endurskin.

*Hugskot til jólahárið*

*Vit ynskja viðskiftafólki okkara eini gleðilig jól og gott nýggjár, við tøkk fyri tað farna.*

salong sølva

Telefon 374415 · 900 Vági





# Joachim heldur jól uttan Felix og Nikolaj

Danska kongahúsið heldur sum vænt jól í Århus. Margretha drottning og Heindrikur prinsur halda altíð jól á Marselisborg Slot í Århus, men í ár vera Felix og Nikolaj ikki saman við ommuni og abbanum og pápa sínum Joachim. Teir halda sambært tv2.dk jól saman við mammu síni Alexandru.

Men kongshúsið verður ikki barnleyst á jólum, tí lítil prinsurin hjá Fríðriki og Mary heldur saman við mammu og pápa sínum jól við restini av kongshúsinum.

**nud**

KØKUR Í SERKLASSA FRÁ INVITA - det personlige køkken



30% í avsláttri uppá COMET í desember

Sandavágs Timburhandil · á Hillingatanga 6
Fo 360 Sandavágur · tel 332700 · fax 332701 · invita@post.olivant.fo